






solorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI

## Dialysa í skugganum • Hugni og upplivingar undir sólini

Ásannandi, at nógvir føroyingar hava skerdar møguleikar at sleppa burtur í feriu, tí at teir eru bundnir at dialysu, veita vit nú eitt tilboð um sólvitjanir við dialysumøguleika. Dialysumiðstøðin hjá samstarvs-felaga okkara, IMED Hospitales, varð bygd í 2010. Hon hevur eina góðskuskipan í samsvari við normativini ISO 9001 og ISO 14001.

Vit ynskja at veita bæði hæmodialysu og sonevnda posadialysu – hetta seinna í samstarvi við týsku fyritøkuna, sum í dag veitir løðin, sum reinsar blóðið hjá føroyskum nýrasjúklingum.

*"Hendan vitjanin undir sponsku sólini er rein heilsubót. Her kunnu Gert og eg sum vanligir sólorkugestir spáka túrar á strondini, vitja áhugaverd støð, eta á góðum matstovum og njóta undirhaldið á Vaglinum. Eg havi eingi nýru, sum kunnu reinsa blóð mítt, men dialysan her gevur mær sama møguleikan sum hinum gestunum at njóta sponsku sólina og allar hinar upplivingarnar. Viðgerðin sjálv riggar eisini avbera væl. Var eg ummælari, gav eg henni 10 stig av 10 møguligum." (Sigrið Mikkjalsdóttir)*

www.solorka.fo • solorka@solorka.com • tlf. +298 221090